# Gamla Scorpiónin spæ



**Scorpiónin spældi góða løtu við áhoyrararnar, innan hon hon stakk, og síðani gav seg fult út í einum rockshowi, sum neyvan nakar hevur upplivað á føroyskri grund áður. Scorpions stóðu óivað fyri bestu konsertini í Summarfestivalsøguni. Her var dygd og alt tað, ið ein verulig rockkonsert skal hava. Gomlu meistararnir eru nú einaferð teir, ið duga kynstrið best,og hóast aldurin, so er onki sum eitur at leypa har garðurin er lægstur. Tað prógvaði tann 2 tímar langa konsertin, sum var eitt ljóð- og ljósbrak, sum flytir framtíðarmørkini í føroyskari festivalsøgu**

SUMMARFESTIVAL

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Klaus Meine, Rudolph Schenker, og teirra harkalið, løgdu mannamúgvuna fyri sínar føtur, tá teir fóru á pall á Summarfestivalinum 2007.

Eini 10.000 túsund fólk bíðaðu spent eftir Scorpions, og vónir og væntanir vóru skrúvaðar upp, tí bólkurin segðist vera í góðum formi, og nýggja fløgan boðar eisini frá góðum, og inniheldur stórhittið Humanity.

## Legendurnar á pall

Veðrið skikkaði sær væl, og stóri pallurin og stóra anleggið stóðu lokkandi og argandi klár. Og so kom frásøgumaðurin Sjúrður Skaale á pall at boða frá, at nú stóð Scorpionmanningin handan palltjaldið.

Og so komu týsku rocklegendurnar á pall.

Fyrstu løgini vóru góð, men eggjaðu ikki, tí fjøldin kendist ikki heilt við hesi nýggju løgini. Og tað var eisini fyrstu løtuna, sum var hetta ein leitandi dansur hjá tónleikarum, og serstakliga ljóðmonnum.

Garvaðu og tryggu rockararnir á pallinum royndu at merkja, hvat hetta var fyri fjøld, ið stóð á vøllinum, meðan ljóðmenninir bardust ein harðan dyst millum fleiri hundrað knøttar í miksaratjaldinum. Fyrsta hálva tíman, ella nakað meira, var ljóðgóðskan heldur svikalig. Eina løtu heilt okey, men so skiftust toppur og botnur at svíkja, og tað kendist heldur løgið onkra løtu, tá ljóðið nærum sløraðist, júst sum tá gomlu kassettuspælararnir "ótu" bondini.

Hetta við ljóðgóðskuni tók eftir mínum tykki nakað langa tíð at fáa uppá pláss, tí tá tað gongur